Fylgiskjal 4.

Viðmerkingar frá Vørn / MRCC til:

**"Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilbúgving"**

**§ 12** Onga viðmerking

**§ 13** Onga viðmerking

**§ 14a** Tað má nágreinast nærri um fráboðanarsentralin. Hvønn skal sentralurin vísa til og hvør er leiðslan hjá hesum sentrali ? Tað tykist eitt sindur ivasamt, at tað er ikki tann sum rindar, sum tekur avgerðir um sentralin viðvíkjandi rakstri, útgerð og virksemi. Annars er upplagt, at um sentralurin verður settur á stovn, so verður hann inn í vaktarhølunum hjá MRCC. Hetta er tó treytað av, at hølini verða lagaði til, soleiðis at fleiri fólk kunnu vera savnaði, uttan at órógva hvønn annan óneyðugt. Eitt vaktarfólk fyri kommunalu tilbúgvingina hevði eisini kunna tikið sær um umsitingarligum arbeiði fyri tilbúgvingina í dagtímunum eftir tørvi. Hetta hevði eisini styrkt fakliga umhvørvið hjá báðum pørtum.
Her kann nevnast at løgreglan um stutta tíð flytir inn í grannalagið, og tá kundi so at siga øll tilbúgvingin í Føroyum (Vørn/MRCC, Arktisk Kommando, kommunala tilbúgvingin og løgreglan) verið savnað í hesum grannalagnum.

Til stk. 4. hava vit hetta uppskot:

*Stk. 4. Stovnseting og rakstur av kommunala fráboðansentralinum skal samskipast við alarmsentralarnar hjá MRCC, løgregluni og heilsuverkinum.*

**§ 16 b** Til stk 1 hava vit hetta uppskot:

*Skipað verður eitt átaksráð, sum skal virka sum millumlið millum átakssamskiparan og kreppuráðið.*
Viðmerking: Vit halda at skaðastaðsleiðsla ikki er eitt heppið orðaval í hesum sambandi.

**§ 21** Um kommunala vaktarfólkið verður staðsett í hølunum hjá Vørn/MRCC hava vit hetta uppskot til §21.

*Løgreglan samskipar átøk á landi, men er talan um hendingar í fjøllum og bjørgum kann løgreglan lata átaksleiðsluna til MRCC, sum síðan loysir uppgávuna saman við kommunalu tilbúgvingi.*

Aðrar viðmerkingar.
Vit meta, at vit hava ein rættiliga vælvirkandi og týdningarmikla tilbúgving á sjónum, men tað sæst ikki í hesi dagføringini av Tilbúgvingarlógini.

LM-099/2020

Vit hava bjargingarfeløg runt um í landinum, sum reka bjargingarbátar og hava gjørt í áravís. Hesir bátar eru ein týðandi liður í tilbúgvingini á sjónum, serliga á nærleiðini. Hetta eru ikki bara uppgávur fyri Vørn/MRCC, men eisini fyri sjúkraflutnings tænastuna og løgregluna. Hetta er ikki nevnt við einum orði í hesum uppskoti. Tað eigur at vera gjørt. Bæði bátar og bjargingarfeløg gera eitt stórt og týðandi sjálvboði arbeiði, og hetta eigur á einhvønn hátt at vera endurspegla í tilbúgvingarlógini.

Vegna Vørn/MRCC

Edvard Bjarnason

Jóhan Múller